## Partabrøvini hækka

Tað bendir alt á eina meiri positiva gongd á partabrævamarknaðinum í Keypmannahavn. Hækkingin í morgun kemur eftir størstu hækkingina í USA í seks vikur. Danski marknaðurin lá nakað aftan fyri restina av Europa í gjár, men í dag er vent í holuni. Meðan europeisku partabrøvini bert hækkaðu smávegis hevði C20-indeksið eina framgongd upp á 0,8%. Serliga partabrøvini í A. P. Møller-Mærsk eru hækkað, ávikavist 2,4% og 1,7% fyri A- og B-partabrøv, meðan eisini FLSmidth partabrøvini hækkaðu 1,7%, skrivar Børsen.



## Selja færri teldur

Altjóða fíggjarkreppan hevur eisini rakt telduhandlarnar. Higartil í ár hava fólk og fyritøkur keypt 18 milliónir færri teldur enn í fjør. Tað merkir, at sølan er seks prosent minni enn í fjør, men tað er hóast alt ikki so ringt, sum tær fyrstu metingarnar søgdu, tí sambært teimum fór sølan at minka meiri enn níggju prosent. Tey marknaðarkønu vænta, aqt sølan fer at veksa aftur út ímóti jólum, og næsta ár vænta tey, at sølan verður heili tíggju prosent størri enn í ár. Tað eru serliga tær smáu farteldurnar, sum halda sølutølunum uppi. Roknað verður við, at 21 milliónir smáar farteldur verða seldar í ár og 30 milliónir næsta ár, skrivar DR.

# Súkkla úr Sveits á G!

**Tríggir sveitsarar eru á veg á súklu úr Alpulandinum til Føroya, har teir ætla sær at fara til G!-festivalin**

FERÐING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nógvir eru hættirnir at ferðast upp á, og mong dáma væl at ferðast úti í fríu náttúruni.

Í hesum døgum eru tríggir sveitsarar á veg til Føroya á súklu. Teir byrjaðu túrin 3. juli úr býnum Treiten í Sveits og eru nú komnir upp móti danska markinum.

Teir vænta at koma til Danmark í morgin og skulu so við Norrönu til Føroya 21. juli. Tá hava teir súkkla umleið 1900 kilometrar.

Teir ætla sær at liggja nátt í Havn, men fara so dagin eftir til Gøtir, har teir ætla sær at verða við á G!-festivalinum.

Tveir teirra hava verið í Føroyum áður. Thomas er giftur við Jónu Joensen úr Syðrugøtu, dóttir Súsannu og Jógvan Salomon Joensen. Thomas hevur verið fleiri ferðir í Føroyum áður. Ida kemur á triðja sinni til Føroya, meðan Res ikki hevur verið í Føroyum áður.

Túrurin hevur gingið úr Sveits fram við Rhínánni til Hollands, síðani móti Bremen, Hamburg, Esbjerg og Hanstholm. Sum skilst hevur túrurin gingið væl. Teir hava sovið í tjaldi og hava hugnað sær óført, tó at tað hevur regnað meiri enn ynskiligt er.

Teir tríggir verða í Føroyum fram til 4. august.



*Teir tríggir súkklararnir hava lagt umleið 1900 kilometrar aftur um seg, tá teir koma til Føroya*

## Útlendskir bankar rýma úr Danmark

**Útlendskir bankar, sum fyri fáum árum síðani høvdu sera stóran áhuga í danska fíggjarmarknaðinum, pakka nú saman aftur og rýma úr Danmark**

FÍGGJARMARKNAÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Meðan útlendskir bankar meiri ella minni stóðu í røð fyri at sleppa at reka bankavirksemi í Danmark, hevur fíggjarkreppan nú fingið fleiri teirra at pakka saman og rýma úr landinum. Tað veit Berlingske Business at siga.

Orsøkin til, at útlendsku bankarnir nú fara úr Danmark, er partvís lítli peningafloymurin, men partvís eisini tí, at teir fáa kreppuhjálp úr heimlandinum, og tí skulu lúka ávís krøv um at halda seg til heimamarknaðin.

Sæð úr einari skrivstovu í New York er Danmark bara orsakað av støddini ikki áhugaverdur marknaður. Tí síggja vit ábendingar um, at bankarnir savna seg um nærumhvørvið, sigur Bjarne Jensen, stjóri í BJ Consult við Berlingske Business.

Krøvini frá fleiri amerikanskum politikarum eru eisini, at hjálparpakkarnir eru ætlaðr at hjálpa amerikanskum vinnulívi og borgarum.

Amerikanski City Bank steðgaði í februar útlánum til danskar privatkundar. Eisini fleiri íslendskir bankar eru í ferð við at lata aftur ella minka virksemið. Norsk/týski bankin DnB Nord boðaði í juni frá, at hann niður raðfestir danska marknaðin og í staðin fer at venda sær móti eystureuropeisku kjarnumarknaðunum.

Somuleiðis er eisini bretski Northern Rock farin úr Danmark, skrivar Berlingske Business.